## Stríð um sess hjá Kirk



Fyrrverandi danski fiskimálaráðharrin, Kent Kirk, hevur nú boðað frá, at hann stillar ikki uppaftur sum valevni hjá konservativa fólkaflokkinum til valið í Region Syddanmark í november. Tað er longu greitt, at tað stendur ikki á hjá flokkinum at finna avloysara fyri Kent Kirk, tí longu nú hava trý evni sagt seg vera til reiðar at taka við sum oddavalevni. Kent Kirk, sum býr í Esbjerg, er hálvur føroyingur. Mamma hansara, Brynhild, ið var ættað úr Oyndarfirði, doyði í síðstu viku, 92 ára gomul.

## Ísland fyrimynd hjá Grønlandi

Á einari kunningarferð í Danmark og Íslandi hevur mentanarnevndin hjá grønlendska Landstinginum millum annað kannað, hvussu íslendingar brúka fjarlestur í sambandi við ymsar útbúgvingar. Formaðurin í nevndini, Kristian Jeremiassen, sigur seg vera hugtiknan av íslendsku skipanini. Sum dømi nevnir hann, at heili 64 prosent av teimum íslendsku námsfrøðilesandi taka partar ella alla útbúgvingina við fjarlestri. Umframt fjarlestur kunnaði nevndin seg um virksemið hjá íslendsku kirkjuni, nú grønlendingar skulu viðgera eina nýggja kirkjuskipan.

# Linda flennir at dómarum



Einasta forðingin hjá sær at vinna kappingina, er sambært Lindu Andrews, at ov fá vaksin fólk fara at atkvøða um, hvør fer víðari í X-Factor

**Blachmann og Remee høvdu hug at harta Lindu Andrews eitt sindur fríggjakvøldið. – Tað merkist, at dómararnir kappast sína millum, og tí skulu teir siga okkurt negativt, sigur ein vælnøgd Linda Andrews**

X-FACTOR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fríggjadagin varð greitt, at føroyska Linda Andrews kom víðari í fyrstu beinleiðis sendingini í X-Factor 2009. Hóast bæði Remee og Blachmann høvdu hug at harta hana eitt sindur, so kom hon ongantíð í trupulleikar av sanginum, hon hevði valt.

- Dómararnir skulu siga okkurt negativt, og tí valdu teir hondina hjá mær. Tað er heldur ongin, sum syngur ein krevjandi sang, sum ikki nýtir allan kroppin at syngja við. Spyr bara Joe Cocker ella Whitney Houston, staðfestir føroyska songkvinnan. Hon leggur afturat, at hon ikki skilir, at Blachmann skal siga nakað um hondina hjá henni, tí í fjør hevði hann ein luttakara, sum gjørdi nógvar løgnar rørslur, og tá tosaði hann bara um, hvussu gott tað var.

### Trýstir dómarar

Hóast Blachmann hevði hug, at siga negativ ting um Lindu, tá hon kom til upptøkuroynd, tí hon er føroyingur, so heldur hon, at hon hevur vunnið hjartað á honum.

- Eg haldi, at Blachmann hevur onki negativt sagt um røddina hjá mær, hann sigur ikki so nógv aftanfyri pallin, og tí er hann so kul, tá hann bara sigur júst tað hann hugsar á pallinum, sigur Linda Andrews. Hon heldur eisini, at Remee sær rættiliga kroystur út.

- Mann sær væl, at hann er pressaður. Hann hevur tey veiku kortini við bólkunum, staðfestir songkvinnan úr Havn.

### Tey eldru mugu atkvøða

Sambært Lindu Andrews, mugu eldru hyggjararnir eisini atkvøða, um hon skal hava ein møguleika at vinna, hóast hon heldur seg vera best.

- Tað gekk heilt væl at framføra, og eg eri bara glað, sigur Linda Andrews. Hon leggur tó afturat, at tað kann vera ein lítil vansi hjá henni, at tey flestu, sum atkvøða, eru rættiliga ung.

- Tey ungu fara ikki at atkvøða fyri eina 35 ára gamlari damu, sum ikki hoppar og dansa á pallinum, sigur Linda Andrews.

### Asian Sensation næstir

Fríggjadagin varð bólkurin Tårnhøj grýttur úr kappingini, og hetta kom óvart á Lindu.

- Eg roknaði við, at Asian Sensation blivu teir fyrstu at vera koyrdir út, tí teir duga ikki at syngja, hóast teir eru øgiliga fittir og sjarmerandi. At Tårnhøj vóru fyrst skilji eg ikki, tí tey duga væl, men kanska var hetta ikki ein framførsla, sum hyggjararnir kundu brúka til nakað, vísir Linda Andrews á.

Hinvegin heldur Linda, at størstu kappingarneytarnir hjá henni eru í bólkinum undir 25 ár.

- Lucas er bara kul. Muhamed er eisini heilt góður og vit fáa at síggja við Sidsel, sigur Linda Andrews, sum er vís í, at tað verður ein av hesum, sum verður hennara nærmasti kappingarneyti.

### Ongan veikleika

- Tað er ongin, sum er á mínum kalibri í kappingini, men tað eru nøkur, sum klára onnur ting, sigur Linda Andrews. Hon er samstundis sannførd um, at hon hevur uppiborið eitt pláss í finaluni, tí hon er nakað serligt. Hon fer tó at taka krittikkin um rørslur hennara til sín, um hetta skal til fyri at vinna.

- Mann hevur ikki brúk fyri einum nýggjum Martin, sum er ein lítil Justin Timberlake. Tí vóni eg, at tað verður onkur, sum ger okkurt, ið ikki er eitt reint kopi, sum vinnur kappingina, sigur songkvinnan.